

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 01 - 2012

# Russiska oljuframleiðslan setti met í 2011

Russar hava ongantíð framleitt so nógva olju sum í fjør. Varaorkumálaráðharrin, Sergei Kudriashov, sigur fyri fjølmiðlunum, at Russland framleiddi 511 milliónir tunnur av olju í 2011, og at tað er tað mesta, síðani Sovjetsamveldið datt sundur. Hinvegin væntar ráðharrin ikki, at tann russiska oljuframleiðslan fer at veksa meiri tey næstu trý árini. -Vit hava fyrireikað okkum til, at vit fara at framleiða úr færri nýggjum keldum tey næstu trý árini, og tí fara vit at leggja okkum eftir at fáa sum mest burtur úr teimum gomlu keldunum, sigur Sergei Kudriashov við sjónvarpið Russia 24. Hann roknar við, at oljuframleiðslan verður um 510 milliónir tunnur í ár og tey bæði næstu árini.